# Krambúðin á Gørðunum í nýggjum hami

Alex Vilhelm avmyndaður framman fyri handilin, tá arbeiðið at fríðkað og útbyggja Krambúðina á Gørðunum byrjaði




**Í januar 2009 eru 112 ár síðani fyritøkan D.J. Vilhelm í Vági bryjaði. Fyritøkan eigur og rekur Krambúðina á Gørðunum, og har verður arbeitt við at renovera og byggja út, og ætlandi verður latið upp í størri hølum sjálvan 112 ára føðingardagin 27. januar**

HANDIL

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: Dagfinn Olsen*

Alex Vilhelm, stjóri í D.J. Vilhelm, fegnast, nú nýggi bygningurin, ið bygdur er frammanfyri gomlu Krambúðina á Gørðunum í Vági, skjótt stendur liðugur.

Handilshølini eru við hesum tvífaldað, men yvirhøvur er talan um stórar broytingar, nú gamli handilsbygningurin verður gjørdur ístand frá innast til uttast, og annars settur í samband við nýggja bygningin.

### 112 ár

Tað verður tó ikki fyri jól, at vágbingar og onnur sleppa til handils í nýggju hølunum, tí málið er, at nýumvældi og útbygdi handilin stendur klárur at taka í nýtslu tann 27. januar 2009. Fyritøkan D.J. Vilhelm byrjaði virksemið í 1897, og sostatt eru tann 27. januar 112 ár síðani, at fyritøkan varð stovnað.

Alt er bjálvað, við at sproyta bjálving inn í, og hetta er nakað, ið kann viðmælast, sigur Alex Vilhelm um gamla partin av húsinum.

Nýggi bygningurin, ið er tað fyrsta ein sær og kemur inní, verður í stóran mun úr glasi, men verður eisini prýðiligur, tí hann skal eisini klæðast við mahogni. Annars verður alt húsið klætt við síðuliggjandi aluminiumsplátum, og mong fegnast óivað um, at gomlu, grønu og slitnu pláturnar nú verða søga.

Innan verður nýggi bygningurin eisini glas, og ein altan verður eisini í hesum bygninginum, ið eisini í stóran mun er úr glasi.

Alt, eisini gamli bygningurin, verður sum nýtt, og innbúgv, so sum teldur, kassar, hillar og annað, verður eisini nýtt.



*Soleiðis sær út, nú arbeiðið er komið væl áleiðis*

Eisini er økið rundum allan bygningin hækkað og lagt undir asfalt, so betri er at koma til og at sleppa av við bilarnar.

Møblasølan verður á ovaru hædd, og restin niðri undir, og Alex Vilhelm sigur, at nú plássið er betri, verður úrvalið eisini størri.

### Arbeiðsligari

Alex Vilhelm fegnast um, at við út- og umbyggingini verður eisini arbeiðsligari, og eisini betri pláss. Eisini á goymsluni verður beti pláss, og lyftarar verða eisini.

- Tað, at bera sofur og annað uppá loft við handamegi, er vónandi søga nú, sigur stjórin í D.J. Vilhelm.

Suðursmíð stendur fyri arbeiðinum, nú Krambúðin á Gørðunum brátt stendur í nýggjum hami.

# »Delirious?« spæla í Kelduni í kvøld

**Báðumegin aldarskiftið hevur enski bólkurin verið best umtókti kristni tónleikabólkurin í Heiminum**

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í Kvøld spælir enski bólkurin "Delirious?" í Kelduni í Skálafirði. Talan verður um fyrstu, einastu og seinastu konsertina í Føroyum. Limirnir í bólkinum fara í næstum hvør til sítt, eftir eina framburðarríka yrkisleið, sum byrjaði fyri fleiri árum síðani.

Í 1992 skuldu Martin Smith (sang og gittar), Tim Jupp (tangentar) og Stew Smith (trummur), skipa fyri tónleikinum til eitt ungdómstiltak. Samanblandingin av ærligu, rámandi tekstunum hjá Martin Smith, og teimum evnaríku tónleikarunum gjørdist sera væleydnað, og tóku áhoyrarnir hesar garpar til sín. Boðini fóru skjótt kring knøttin, at hetta var tann mest spennandi tónleikurin, sum var komin frá kristnum tónleikarum í fleiri ár. Hetta gav "Delirious?" veruligan vind í seglini, og eftir at hava spælt saman í 4 ár, so blivu teir yrkistónleikarar fulla tíð, nú vóru eisini Stu G (gittar) og John Thatcher (bass) komnir við í bólkin.

Fløgan, ið nevnist "King of fools", sum kom í 1997 var fyri mong sera kontroversiel, men vóru fleiri løg at finna á ensku hittlistunum hetta árið.

Nú byrjaði USA eisini at fáa eyguni upp fyri hesum bólkinum, og kom "King of fools" á ein amerikanskan hittlista, og lá sangurin har í 18 vikur. Fleiri enn 200.000 "King of fools"-fløgur blivu seldar í USA. Amerikanska platufelagið, Virgin Record fekk eyguni upp fyri bólkinum. Skipað varð fyri einari konsertferð, sum førdi "Delirious?" til Kanada, Avstralia, Ný Sæland, Evropa og USA. Ein søluavtala við EMI gjørdi áhugan fyri bólkinum enn stórri. Næsta fløgan Mezzamorphis bleiv enn betri móttikin og vísti veruliga muruna hjá Delirious?.

Í 1997 vitjaðu teir 25 lond, og spældu fyri fleiri enn 1 miljón áhoyrarum.

Í 1999 byrjaðu limirnir í Delirious? meira málrættað at arbeiða við sínum "live"-framførslum. Tað var teirra hjartamál at røkka út til áhoyrarnar, og frá pallinum geva tað besta teir áttu. Hetta førdi til at teir náddu milliónir av menniskjum við teira framúrskarandi tónleiki og bersøgna boðskapi. Teirra framgongd bleiv bara størri og størri, og teir seldu alsamt fleiri



og fleiri fløgur.

Í 2005 spældu Delirious? Fyri pávanum á World Youth Day. Á Olympisku Leikunum í Athen í 2004 spældu teir fyri fleiri av heimsins leiðarum. Í 2005 spældu teir fyri einari risastórari mannfjøld av muslimum í Marokko á einum stórum tiltaki, sum nevndist "Friendshipfest 2005".

Tær mongu ferðirnar kring Heimin hava havt eitt stórt árin á Delirious?. Teir hava ikki bara verið á fimm-stjørnaðum gistingarhúsum. Teir hava eisini vitjað fátækrabýlingar, og eisini støð við stórum ruskdungum, og har hava limirnir í bólkinum staðið andlit til andlit við risastórt fátækradømið. Hetta ávirkaði eisini boðskapin í seinastu fløguni, sum nevnist, "Kingdom Comfort". Fløgan fortelur opinskárað um lívsins skuggasíður.

Í kvøld kl. 20 fara teir so á pallin í Kelduni í Skálafirði. Hetta er uttan iva ein konsert, sum mong í Føroyum hava sæð fram til, og fer hon uttan iva at verða minnilig fyri tey, sum dáma tónleik av hesum slagnum.